## Føroya Banki letur gittar og atgongumerki

Aftur í ár fer planet.fo at lata føroyskum tónleiki heiðurslønir á Planet Awards. Høvuðsstuðulin Føroya Banki skipar nú fyri kapping.

Á heimsíðuni hjá Føroya Banka, skrivar bankin:

Føroya Banki er høvuðsstuðul hjá Planet Awards, tí bankin stuðlar frambrotum í føroyskum tónleiki. Tónleikavirðislønirnar í ár verða handaðar á Hotel Føroyum leygarkvøldið 27. januar. Tá verða almannakunngjørd:

- Besta útgáva
- Besti bólkur
- Besti sangari
- Besta songkvinna
- Besti nýggi bólkur
- Besti útlendski bólkur
- PLANET-herðaklappið

Í sambandi við tiltakið skipar Føroya Banki fyri eini spennandi kapping millum vitjandi á heimasíðu bankans. Møguligt er at vinna ein spildurnýggjan Gretch Electromatic elgittar við tasku fyri 7.500 kr og heili 25 atgongumerki til gallakvøldið 27. januar.

Øll hava møguleika at vinna guitaran, men tú mást vera 18 ár fyri at ogna tær atgongumerki til gallakvøldið.

**nud**

# Nú er tolið uppi




*Nú er tolið uppi, tí vit vilja ikki longur lata okkum lynda at verða skúgvaðir til viks. Tí skal trupulleikin loysast nú, sigur Gunnar Hjelm, portørur*

**- Hendir onki nú, fara vit at brúka okkara fakfelagsrætt, sigur Gunnar Hjelm, sum er talsmaður hjá portørunum. Men hann vil ikki siga um hetta merkir, at portørarnir kring landið fara at leggja arbeiðið niður**

PORTØRAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er tolið uppi!!!

Gunnar Hjelm er portørur á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Saman við stórum meiriluta av øllum portørunum kring landið, gjørdi hann í heyst av at melda seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag, upp í Starvsmannafelagið, tí tað var har, at teir meta seg hoyra heima.

Men hingartil hevur tað ikki borið til at fáa Fíggjarmálaráðið at góðtaka, at porøtørarnir hava skift fakfelag.

Allir portørarnir hava verið limir í Havnar Arbeiðsmannafelag og tí er tað hetta felagið, sum hevur havt rættin at samráðast um lønarsáttmála við portørarnar.

Fíggjarmálaráðið er ikki sinnað at flyta sáttmálaøkið yvir í Starvsmannafelagið. Nakrir portørar eru eisini eftir í Havnar Arbeiðsmannafelag og Fíggjarmálaráðið vil so slett ikki hoyra talan um at samráðast við tvey fakfeløg um sama sáttmálaøkið.

Men hóast portørarnir nú hava stríðst meiri enn tríggjar mánaðir til fánýtis, eru teir onga leið komnir enn.

Og Gunnar Hjelm ger púra greitt, at málið verður ikki slept.

- Hóast vit ongan veg koma, skal tað vera púra greitt, at málið verður ikki slept, sigur hann.

Hann staðfestir eisini, at nú skal okkurt henda í málinum.

- Vit hava mist tolið. Hendir onki nú, fara vit at brúka tann fakfelagsrættin, sum vit hava, sigur hann.

- Merkir tað, at tit fara at leggja arbeiðið niður?

Tað havi eg ikki sagt. Tað einasta, eg sigi, er, at vit eru til reiðar at brúka tey fakfelagsrættindi, vit hava. Um tiltøk verða sett í verk, og, hvørji tiltøkini verða, veit eg ikki, sigur Gunnar Hjelm.

Hann vísir á, at vit hava fakfelagsfrælsi í Føroyum og tí eigur Fíggjarmálaráðið at viðurkenna, at ein heilt stórur meiriluti av portørunum heldur vilja verða limir í Starvsmannafelagnum.

- Eg dugi heldur ikki at síggja, at Havnar Arbeiðsmannafelag hevur áhugað í at varðveita samráðingarrættin á einum øki, teir næstan ongar limir hava á. Hinvegin er heldur ongin meining hjá okkum at vera limur í einum fakfelag, sum ikki kann hava ein sáttmála við.

- Portørarnir standa rimmar fast í hesum máli og tí vilja vit hava eina loysn á tí nú, sigur hann.

### Skúgvaðir til viks

Gunnar Hjelm sigur, at portørarnir hava tí biðið um fund við partarnar um at fáa viðurskiftini í rættlag.

- Vit kunnu ikki liva við at vera skúgvað til viks og verða okkara sjónarmið ikki vird, er tað sólarklárt, at vit fara at brúka tey fakfelagsrættindi vit hava, sigur Gunnar Hjelm.

Fyri at fáa málið loyst, hava tey fleiri ferðir biðið um fund við landsins myndugleikar um støðuna.

Í hesum sambandi vilja vit hava Fíggjarmálaráðið at viðurkenna, at samráðingarrætturin skal flytast yvir til Starvsmannafelagið, har nógv teir flestu portørarnir eru limir.

- Men tað hevur ikki eydnast enn at fáa Fíggjarmálaráðið á fund við okkum um málið.

Samstundis hevur Fíggjarmálaráðið boðað frá, at tað betalir ikki limagjaldið fyri teir limir, sum eru farnir í Starvsmannafelagið.

Tað mugu teir einstøku limirnar sostatt avgreiða sjálvir.

- Hetta er at leggja ábyrgdina av tryggingarviðurskiftunum yvir á hvønn einstakan portør. Tað er ein sera, sera álvarslig støða, tí tá kann altíð okkurt henda, sum førir við sær, at ein portørur ikki er rætt tryggjaður og tað kann fáa álvarsligar avleiðingar, tann dagin, ein portørur hevur brúk fyri tryggingini.

Fíggjarmálaráðið sigur, at limagjaldið er ein partur av sáttmálanum og sáttmálin er við Havnar Arbeiðsmannafelag.

So mikið meiri átrokandi er tað, at fáa ein fund um viðurskiftini.

Men tann fundin fáa vit ikki.

Og tað lata portørarnir sær ikki lynda longur, leggur Gunnar Hjelm dent á.